VÍF-VB 32-20 (14-9):

# Klassamunur

**Eftir greiða ósigurin í Vestmanna er eingin sum helst ivi um, at seinasta orðið hjá VB í gulldystinum er sagt**

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*

Tað varð sagt undan dystinum, at hetta allar helst var seinasta útkall hjá VB, um tær skuldu hava nakran sum helst møguleika at gera seg galdandi í gullstríðnum hetta kappingarárið.

Í ljósinum av hesum er lætt at staðfesta, at VB nú er liðugt í so máta, og dysturin leygardagin bar eisini greið boð um, hví so er.



*Tá VÍF hugsaði meira um at róta seg inn í verjuna, heldur enn at spæla, fekk VB brádliga fatur aftur í dystinum, men hetta vardi tó ikki so leingi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Passiv VB-verja

Tað var nevnliga greitt frá fyrsta bríksli, at talan fór at gerast um ein sera truplan dyst hjá VB, og mest av øllum, so tóktust teir eisini sjálvar at vera greiðar um hetta.

Fyrstu minuttirnar var fjálturin á leikarunum sera stórur. Sjálvsálitið var at kalla als ikki til staðar, og tí hendi tað ferð eftir eftir ferð, at bóltar vórðu tveittir burtur, og tá VÍF soleiðis fær kontra spæli forerað, eru ikki so nógv, sum standa teimum kurl.

At vágbingar harafturat tóktust sera passivar í miðverjuni hesa løtuna, bøtti so avgjørt ikki um møguleikar teirra. Ikki minst dugdi Jacklin væl at gera sær dælt av hesum, og meðan mótstøðuverjan bakkað eftir hæli, setti Jacklin av, og so var aftur lív í meskunum.

## Ryktu seg leysar

Eftir eitt hart tiltrongt time-out, fekk VB tó nakað av skili í aftur spælið. Ferðin varð sett nakað niður. Álopsroyndirnar vórðu avsluttaðar við skoti, og hetta forðaði VÍF í at spæla sítt kontra-spæl. At heimaliðið so eisini ferð eftir ferð fór inn í verjuna at róta, ístaðin fyri at pressa spælið upp, gjørdi ikki støðuna verri, og áðrenn nakran vardi, hevði VB minkað muni niður í tvey mál.

Høvdu vágbingarnir megna at hildið hetta til hálvleiks, so kundu tær kanska gjørt ein veruligan vørr, men tá so Sóley og Jacklin syrgdu fyri trimum málum á rað beint undan steðginum, so var alt í veruleikanum avgjørt. Andlitsbrøgdini á leikarunum søgdu eisini, at hetta var avgjørt.

Hetta sást eisini aftur í seinna hálvleiki. VB-spælið tóktist nú at kalla hálvhjartað. Tær høvdu sera ilt við at spæla seg ígjøgnum verjuna, og fingu tær skot á, so stóð Hallfríð kortini fyri, og so líðandi økti VÍF alt meira um munin.

Eitt skifti royndi VB seg heldur ótraditionelt við at fara langt út á vøllin eftir VÍF, men hetta gjørdi bara ilt verri, og eftir hetta tóktust gestirnir at hugsa meira um at avmarka tapið. Nakað sum eydnaðist so dánt, tí tey 12 málini, ið vóru á muni, siga sum so ikki tað stóra um, hvussu munurin var á teimum báðum liðunum leygardagin. Hann var nógv størri enn so.

## Mugu fáa mótstøðu

Sum nevnt í byrjanini, so má møguleikin hjá VB at blanda seg í oddin nú vera fokin. Seks stig eru nú upp til VÍF, og hóast hetta verður hálverað eftir grundspælið, so skal neyvan roknast við, at VÍF missir so frægt sum trý stig í ár.

Spurningurin tykist eina mest vera, um tær missa nakað sum helst. Liðið hevur sterkastu leikararnar í landinum. Tær tykjast vera í betri venjing enn mótstøðuliðini, og í løtuni tykist einasti spenningurin í kappingini snúgva seg um, hvørt Stjørnan yvir høvur megnar at skala tær, tá liðini hittast um tvær vikur.

Onkur nevndi, at skuldi VÍF fáa nakra veruliga mótstøðu, áðrenn tær fara at umboða Føroyar í Europa-Cup, so áttu tær kanska at roynt seg móti einum samansettum liði, og kanska kundi hetta verið eitt gott hugskot. At vera so greitt við yvirvág í hvørjum einasta dysti, kann ikki vera mennandi í longdini, og fyri føroyskan hondbólt er jú at vóna, at VÍF fer at røkka einum góðum úrsliti, tá europeisku dystirnir verða á skránni.

### Dysturin í tølum:

**VÍF-VB 32-20 (14-9)**

Málskjúttar:

VÍF: Ioana Rápa 9(5), Jacklin Durhuus 5, Sóley Mikkelsen 4(1), Nicoleta Radu 3, Alis Høghamar 3, Fríða Marjunardóttir 2, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 2, Jórun Ludvig 2, Bargara á Rógvi 1, Randi Kúrberg 1

VB: Gurið Mortensen 8, Regina Radó 6(2), Gabriella Fekete 2(1), Sólrun Krosslá 2, Rannvá Augustinussen 1, Margreth Augustinussen 1

Brotskøst: VÍF 6, VB 4

Útvísingar: VÍF 3, VB 2

Dómarar úr StÍF: Pole Hansen & Jústines Justinussen. Høvdu tamarhald á alla tíðina, og tóktust eisini at hava eina hampuliga greiða linju í dømingini.

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 VÍF | 7 | 7 - 0 - 0 | 217 | 130 | 87 | 14 |
| 2 Stjørnan | 7 | 6 - 0 - 1 | 205 | 155 | 50 | 12 |
| 3 Neistin | 8 | 6 - 0 - 2 | 180 | 154 | 26 | 12 |
| 4 VB | 8 | 4 - 0 - 4 | 198 | 198 | 0 | 8 |
| 5 Kyndil | 8 | 1 - 0 - 7 | 178 | 223 | -45 | 2 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 0 - 6 | 124 | 183 | -59 | 2 |
| 7 Sóljan | 7 | 1 - 0 - 6 | 147 | 206 | -59 | 2 |

## Støðan 1. deild menn

| | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 Neistin | 8 | 6 - 2 - 0 | 233 | 208 | 25 | 14 |
| 2 VÍF | 7 | 6 - 1 - 0 | 210 | 166 | 44 | 13 |
| 3 H71 | 8 | 5 - 0 - 3 | 218 | 216 | 2 | 10 |
| 4 StÍF | 8 | 3 - 1 - 4 | 220 | 218 | 2 | 7 |
| 5 Tjaldur | 7 | 2 - 1 - 4 | 165 | 176 | -11 | 5 |
| 6 KÍF | 8 | 1 - 1 - 6 | 197 | 229 | -32 | 3 |
| 7 Kyndil | 8 | 1 - 0 - 7 | 184 | 214 | -30 | 2 |

## Máltindarnir:

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 83 | (24) |
| Gabriella Fekete | VB | 81 | (21) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 67 | (7) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 55 | (20) |
| Ioana Rápa | VÍF | 52 | (14) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 44 | (21) |
| Birita Wardum | Neistin | 39 | (3) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 37 | |
| Ileana Manulescu | StÍF | 36 | (3) |
| Regina Radó | VB | 35 | (6) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 33 | |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 31 | (1) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 31 | (3) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 31 | (7) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 30 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF | 59 | (17) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 52 | (6) |
| Finnur Hansson | H71 | 51 | (15) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 48 | (8) |
| Heini Joensen | Neistin | 48 | (16) |
| Bjarni Wardum | H71 | 46 | (12) |
| Høgni Klein | Kyndil | 45 | (2) |
| Ingi Olsen | VÍF | 44 | (6) |
| Sámal Joensen | VÍF | 43 | (6) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 37 | |
| Dorica Tomic | KÍF | 37 | (7) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 37 | (15) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 36 | (2) |
| Artur Johansen | StÍF | 35 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 35 | (6) |




Fiskimálastýrið

# Samskipari til Fiskiveiðieftirlitið

Starv sum samskipari á Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskiveiðieftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

Talan er um eitt nýtt starv við spennandi avbjóðingum, har møguleiki verður fyri at royna seg á einum øki, ið alla tíðina er fyri øktum krøvum á altjóða støði, og har dagføring og menning av skipanum og starvsfólkum er ein týðandi liður í dagliga arbeiðinum.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Uppbyggja og seta í verk trygdar- og leiðsluskipan eftir ISM-koduni
- Áhaldandi viðlíkahald og dagføra trygdar- og leiðsluskipanina
- Ráðgeva deildarstjóranum og taka sær av øllum málum viðvíkjandi viðlíkahaldi av skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum
- Hava dagligu umsitingina av starvsfólkaviðurskiftunum á Fiskiveiðieftirlitinum um hendi

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal:
- Hava útbúgving sum verkfrøðingur ella
- Hægstu maskinmeistaraútbúgving ella
- Hægstu nautisku útbúgving
- Hava góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Kunna arbeiða sjávlstøðugt
- Hava góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

Hollar starvsroyndir og royndir við at seta í verk skipanir er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytirnar eru sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheitið er samskipari og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til deildarstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Fiskimálastýrið tlf. 353050 og tosa við Elmar Højgard, deildarstjóra á Fiskiveiðieftirlitinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 11. desember 2001 kl. 15.30.
Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskiveiðieftirlitið,**
Postsmoga 347, 110 Tórshavn



# Leiðari til skiljihøllina hjá IRF á Hagaleiti

IRF søkir við hesum eftir leiðara til Skiljihøllina á Hagaleiti at byrja 2/1-2002, ella skjótast tilber.

Leiðarin hevur beinleiðis tilvísing til leiðsluna í IRF.

- standa fyri móttøku og viðgerð av pappíri, stórsekkjum, dekkum og trolleivdum o.l.
- standa fyri avskiping og sølu av tilfarinum
- samskifta við kommunur og virkir um skiljing av burturkasti
- vera við at gera upplýsandi tilfar um endurnýtslu
- vera við at tilrættaleggja innsavningina
- hava ábyrgd av viðkomandi starvsfólkum

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni- og telduarbeiði. Kunnleiki til Concorde Axapta og SQL er ein fyrimunur.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setur krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu.

Hevur tú hollar vinnuroyndir og ástøðiliga útbúgving, eitt nú miðnáms- ella aðra viðkomandi útbúgving, ert tú møguliga tann vit søkja.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Erik Lervig ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

**IRF**
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39 · FO-520 Leirvík

*innan 7. desember 2001*

***IRF hevur til endamáls:***
*Sambært umhvørvisverndarlógini hava kommunurnar ábyrgdina av innsavning og viðgerð av burturkasti.*

*IRF ger hetta arbeiðið fyri kommunurnar.*

*IRF hevur eina brennistøð, skiljihøll til pappír og papp, seks tyrvingarpláss, umlastingarstøð, ruskbilar, oljureinsiverk, lastbila- og bingjuverkstað, slamsúgvarar og rottangatænastu.*

*Uml. 60 fólk eru í starvi hjá IRF.*









# Hús til leigu

Dupulthús til leigu við Villingardalsvegin við sera góðum útsýni.

1. hædd: gongd, bryggers, stórt baðirúm við bað og brúsu og stórum klædnarúmi og tvey verilsir.
2. hædd: wc, sovikamar, køkur, stova, gongd og altan + ovasta loft. Eisini er møguleiki at leiga stóra garasju, ið hoyrir til húsini.

Helst leigusáttmáli í min. 2 ár, til fólk, ið fara væl um ella fyritøku. Prísuppskot 8.000,00 + ljós og hita.

**Bill. mrk. 3388**






Sosialurin
www.sosialurin.fo